tíðindablaðið sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakkstein, Niclas Johannesen
**Yngd:** Jákup Mørk

**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** Sosialurin

# Landsstýrið og almennar tænastur

## *Oddagrein*

VIT hava nú í longri tíð hoyrt og lisið um syndarligu støðuna á fleiri av landsins mest týðandi stovnum, her serstakliga sjúkrahúsverkinum og strandferðsluni. Vit síggja, hvussu hesir stovnar eru við at syndrast innanífrá - um somu tíð sum politikarar leggja dentin á, hvussu stóran týdning hesir stovnar hava. Og um somu tíð breggjar fíggjarmálaráðharrin sær av, hvussu nógvar hundrað milliónir hetta landsstýrið hevur megnað at leggja til síðis.

TAÐ er alla æru vert, at eitt landsstýri rekur ein fíggjarpolitikk, sum ber í sær, at man kann leggja pengar til síðis. Hetta er eitt stavnhald, sum vit øll eiga at hava. Men tað ber ikki til - um somu tíð, sum tú táttar í innan tað almenna við eitt nú at áleggja tí at gjalda part av lønarvøkstrinum yvir verandi játtanir - at krevja av okkara heilsuverki, av strandferðslu og øðrum almennum stovnum, at hesir skulu varðveita sama tænastustøði og helst betra um tað. Tað er ein so ótrúlig sjálvmótsøgn og ein so stór niðurgerðing av teimum fólkum, sum longu eru noydd at renna skjótari á umrøddu almennu stovnum, at hetta er órímuligt og ósakligt og ómenniskjansligt.

TAÐ hevur verið sagt, at lagt verður til síðis til fullveldið. Tað er eisini ein ærlig søk. Men tá eiga okkara stýrandi eisini at spæla við ærligum kortum í aðrar mátar. Og tað er m.a. at siga fyri Føroya fólki, at hetta landsstýrið rekur ein politikk, sum hevur til endamál at minka um og gera almennu tænasturnar verri. Hvussu nógv tú enn tosar um rationalisering og effektivisering, so ber ikki til at fáa tað sama burtur úr verandi stovnum eitt nú sjúkrahúsverkinum, skal t.d. lønarvøksturin fara burtur av verandi játtanum, sum longu frammanundan eru skerdar.

FØROYA fólk eiga at gera sær greitt, hvat er við at henda í løtuni. Og tað, sum hendir, er, at landsstýrið longu stýrir landinum sum vóru vit fullveldi. Men landsstýrið roynir samtíðis at fjala út yvir, at hetta er so, tá tað ræður um almennu stovnarnar. Hyggja vit at tí størsta almenna stovninum í landinum, Landssjúkrahúsinum, so er hann so niðurkoyrdur, at spurningurin er bara, nær vit als ikki hava eitt meginsjúkrahús longur. Og hvat dugur er í at hava lokal sjúkrahús í Klaksvík og á Tvøroyri, um høvuðssjúkrahúsið verður drenað fyri keftir? Hvar er andstøðan í hesum máli?

***Sosialurin***

## Viðmerking:

# Almennar skjalagoymslur



Í september í fjør gav Løgmansskrivstovan út bók við heitinum »Føroyar í kalda krígnum«, sum millum manna beinanvegin fekk navnið "svartabók". Nakrar dagar frammanundan hevði Føroya Landsstýri givið út bókina "Hvítabók". Meðan orðið hvítabók merkir "kritisk dokumentation og partsindlæg over for offentligheden" (Danmarks Nationalleksikokn), so er orðið svartabók í hesum føri óivað bert prógv um, hvussu kvik vit eru at eyknevna og í hesum føri als ikki niðrandi.

Sum tað framgongur av formælinum, og nú er tað altso »svørtubók« vit tosa um, so hevur bókin, sum er tann fyrsta av tveimum (ella kanska fleiri?) við støði í løgtingavgerð frá 19. apríl 1996 um savnan av hernaðarligum skjølum í USA. Løgmaður hevur lovað, at líknandi kanningar fara at verða gjørdar á skjalasøvnunum handan jarntjaldið, ið var, tá ið neyðug peningajáttan frá løgtinginum fyriliggur.

Ætlanin við hesi lítlu grein er ikki at ummæla bókina, slíkt krevur aðrar knokkar, men eg fari tó at gera vart við tað heldur óvanliga, at bókin leggur út við einum samandrátti. Vanligt ella neyðugt er at hava lisið eina bók lidna fyri at kunna fata ein samandrátt, mótvegis fororðinum, sum skal lesast áðrenn farið verður undir sjálva bókina.

Hetta er annars óivað væl úr hondum greitt arbeiði, sum í stóran mun er farið fram á ríkisskjalasavninum í Keypmannahavn og á skjalasøvnum í USA. Ikki uttan orsøk kunnu fólk tí spyrja: júmen, er onki at finna á Landsskjalasavni Føroya ella í skjalagoymslum landsstýrisins; tað framgongur so ikki av bókini.

Vit, sum eru eldri ella gomul, minnast, at Landsstýrið 1963/66 - sokallaða sjálvstýrislandsstýrið - í stóran mun var merkt at NATO-politikki. Legði hetta landsstýri ongi skjøl eftir sær, sum hava relatión til Føroyar í kalda krígnum í tíðarskeiðnum 1945/1967? Eru vit farin yvir um ánna eftir vatni, er nærliggjandi at spyrja. Hesin spurningur kastar næsta spurning av sær: í hvørjum standi eru okkara almennu skjalagoymslur. Ikki fyrr enn í 1992 fingu vit eina veruliga lóggávu um skjalsøvn, sum er so strong, at vit kunnu verða koyrd í Skansan, um groft brot móti lógini verður framt. Hetta, at umsita almenn skjøl, er sostatt eitt sera álvarsligt mál.

Hann, ið hetta skrivar, er vitandi um, at journalin og arkivið hjá landsstýrinum varð umsitið av sera arbeiðssomum og samvitskufullum fólki, so sum strangliga ansaðu eftir at arbeiða eftir galdandi reglum, sum fyriskipað var, herundir at alt varð journaliserað. Henda profiessionella skráseting og umsiting var ósvikalig í 40 ár, men so fór at bila, ikki tí at dugnafólk sum frá leið var vorðið gamalt og yngri komið í teirra stað.

Als ikki.

Fyri ikki so langari tíð síðan skuldu útvegast skjøl í ávísum journalum í arkivinum í Tinganesi, men leitað varð til fánýtis, so rakslánar vóru tær, journalirnar.

Hetta hevur tó onki við Føroya í kalda krígnum at gera.

Fara vit meira enn 60 ár aftur í tíðina t.v.s. umleið tá ið seinni veraldarbardagi brast á, renna vit okkum í tveir almennar stovnar: Løgtingsskrivstovan og Færøernes Oppebørselskontor, sum í dagligari talu varð kallað Gjaldstovan ella Uppibørsilskontórið. Skjølini hjá hesum báðum stovnum vórðu goymd uppi á loftinum í Løgtingshúsinum, og her var talan um satt listaverk - um ein skjalagoymsla kann fáa slíkt heiti, - sum við akkuratessu og gjøgnumførdum ordan var ætlað fólki í umsitingini at handfara og arbeiða við. At finna skjøl undir slíkum umstøðum var leikandi lætt.

Fyri umleið 35 árum síðan varð hetta meistaraverk av eini skjalagoymslu sundursorlað, hyllar og skáp skrødd niður og alt tveitt út í gongina á nevnda lofti, tí ávísir løgtingsmenn kravdu "lebensraum". Nakrar bøkur og okkurt annað varð bjargað undir væðingina í Tinganes og í onkran kjallara í Havn, men um tað nógva, sum varð tjokkað í sekkir, endaði á landsskjalasavninum ella í brennistøðini er ilt at siga nakað um.

Hetta hevur heldur onki við Føroyar í kalda krígnum at gera.

Um henda primitiva vandalisma hevði støði í barnsligari nationalismu ella vanligum mentunarloysi er eisini ilt at siga nakað um, men eitt er vist: um skjalagoymslurnar handan jarntjaldið, ið var, hava fingið somu vanlagnu, sum her er sagt frá, fara menn at draga svart, tá ið teir eru komnir eysturum at skriva annan partin av "Svørtubók".

Annars er at siga um sjálva bókina, at hon hevði ligið betri í hondini, um hon (bókin) hevði somu støðd sum t. d. "Hvítabók"

**Heri Mohr**

# Eykasýning av Móðir Sjeystjønu

Eykasýning av Móðir Sjeystjørnu - ein tónleikamynd, verður í leikhúsinum hjá Grímu á Galmla Meiarínum í Tórsgøtu Sunnudagin tann 13. februar 2000 kl. 16

Leikurin, ið byggir lá skaldsøguna hjá William Heinesen við sama navni, hevur verið sera væl umtóktur og hevur fingið sera góð ummæli. Fullsettar skúlasýningar hava verið. Neyðugt hevur verið og er framhaldandi við eyka skúlasýningum. Til ta seinastu almennu sýningina var fullsett, og fólk fóru til hús aftur, eins og nógvir fyrispurningar hava verið um eykasýningar. Higartil hava umleið 3000 fólk sæð leikin.

Við tað at spælt verður sunnudagin kl. 16 er sostatt enn møguleiki hjá avbygdafólki at síggja leikin og sleppa til hús eftir sýningina. Tað verður ikki farið á bygd við leikinum Móðir Sjeystjørnu.

Atgongumerki kostar kr. 100 kr., men bólkar yvir 20 fólk fáa avsláttur. Eisini ber til hjá virkjum og stovnum at keypa sýningar. Meira fæst at vita um hetta frá Grímu ella Kunningarstovuni.

Leikurin viðger tey afturvendandi menniskjansligu fyribrigdini, bardagan millum lív og deyða, tað tímiliga og tað æviga, dreym og veruleika, kærleika og vón og mangt, mangt annað.

Pallmyndin hjá Elisu Heinesen er einføld, men sera spennandi og nýskapandi og gevur saman við ljósinum leikinum aðra vídd, enn vit vanliga eru von við.

Plakatin til leikin er klippið hjá William til bókina, og hevur Elisa eisini gjørt nýtt lay-out til myndina, so úrslitið er ein sera vøkur, litrík plakat, sum fæst til keyps í bókabúðunum og í samband við sýningarnar.



Eisini í donskum bløðum er ummæli av leikinum, saman við umrøðu av øllum tiltøkunum, ið vóru á 100 ára degi Williams, og skrivar Erik Skym Nielsen m.a. soleiðis í Information, tann 19. jan.:

„Hvor velgørende var det da ikke at se hans forfatterskab - ikke lobhudlet, men brugt, og brugt intteligent, i den teaterforestilling over Moder Syvstjerne, so ensemblet Gríma hold premiere på lørdag aften!"

Tónleikurin og ljóðmndin hjá Stamen Statchev gevur eisini leikinum sín serliga hugtakani dám.



# Kunna um tað vit kunna

*FULLVELDI. Víðgitna trúnaðarstemplið á uppritinum hjá sitandi landsstýri verður ikki standandi. Tá ið uttanlandsnevndin er liðug við arbeiði sítt sum ráðgevandi nevnd, verður stemplið strikað. Landsstýrið vísir øllum andstøðuákærum um vantandi kunning aftur*



*Høgni Hoydal og Føroya Landsstýri eru nøgd við kunningina í sambandi við ætlanirnar at vinna landinum tjóðfrælsi*
**Mynd: Jens Kristian Vang**

HØGNI MOHR

Føroya Landsstýri fer komandi mánaða undir størstu politisku avbjóðing í nýggju politisku søgu landsins. Í seinnu helvt av mars fer ein føroysk sendinevnd við Føroya løgmanni, Anfinni Kallsberg á odda til Danmarkar at samráðast við donsku stjórnina.

Ætlanin er at fáa í lag eitt sáttmálauppskot, ið staðfestir, at Føroyar gerast eitt frælst fullveldi. Eisini hevur landsstýrið í hyggju at skilgreina samstarv framtíðarinnar millum tey bæði sjálvstøðugu londini, Føroyar og Danmørk.

**Politiskt kunningarrit**

Fram ímóti fólkaatkvøðuni um hetta týdningarmikla mál, fer landsstýrið at leggja stóra orku í kunning. M.a. við at strika trúnaðarstemplið á uppritinum

Politikarar í Føroyum og í Danmørk hava longu fingið nógv tilfar um málið, og í hesi vikuni varð eitt rit sent øllum limunum í løgtinginum og danska fólkatinginum.

Í ritinum verður í stuttum greitt frá endamáli landsstýrisins, ið er at vinna Føroyum tjóðfrælsi, eins og greitt verður frá grundgevingunum fyri, at taka fulla ábyrgd av landinum. Grundgevingarnar eru býttar í fleiri partar. Ógreiða polistiska ábyrgdarbýtið og ymisku politisku áhugamálini í Føroyum og Danmørk verða nevnd. Við grundarlagi í nýggjari søgu, t.d. bankagøluni, verður staðfest, at politisk og búskaparlig ábyrgd hevur vantað í Føroyum, og at donsk áhugamál kunnu køva tey føroysku. Eisini verða truppulleikarnar við felags uttanríkispolitikki, ið sum kunnugt fleiri ferðir hava borið við sær stríð millum føroyskar og danskar myndugleikar, nebndir í ritinum.

Í politiska kunningarskrivinum verður gjørt púra greitt, at føroyskt fullveldi ikki fer at kvetta sambandið við danir.

"...ætlanin er tvørturímóti at skapa karmar um eitt nýtt og betri samstarv millum londini...", stendur í kunningarritinum frá Føroya Landsstýri.

**Uttanlandsnevndin ráðgevandi**

Høgni Hoydal, landsstýrismaður, heldur tað hava sera stóran týdning, at bæði politikarar og borgarar í Føroyum verða kunnaður. Og landsstýrismaðurin er nøgdur við kunningina, hóast oddafiskarnir í Sambandsflokkinum og Javnaðarflokkinum við jøvnum millumbilum finnast at kunningini.

- Eg haldi, at andstøðan átti valt, um hon er í parti við føroyingum ella donsku stjórnini, sigur hann. Landsstýrismaðurin sipar til, at royndirnar at gera alment vart við føroyska spjaðing í fullveldismálinum, kunnu hava við sær, at eitt gott úrslit verður verri at vinna við samráðingarborðið.

- Samráðingarúrslitið verður partvís treytað av, hvussu vit føroyingar standa sum eind, sigur Høgni Hoydal.

Eitt samt landsstýrið vísir andstøðuatfinningunum í sambandi við kunningina í uttanlandsnevndini aftur. Landsstýrismanningin staðfestir, at uttanlandsnevndin er ein ráðgevandi nevnd, har tað eigur at bera til at fáa góð ráð um t.d. samráðingarstrategiir.

Helena Dam á Neystabø, landsstýriskona, kom á tíðindafundi í gjár við einari inniligar áheitan á andstøðulimirnar í uttanlandsnevndini:

- Arbeiðið til frama fyri føroysk áhugamál...

Viðvíkjandi kunningini millum andstøðulimir, sigur Helena Dam á Neystabø, at landsstýrið kunnar tað, ið tað kann.

## Kunna teg á telduni

Føroya Landsstýri hevur latið tvær nýggjar heimasíður upp á alnetinum. Á www.grundlog.fo ber til at fylgja við arbeiðinum at smíða føroyska grundlóg. Fólk kunnu meta um vitan sína við at luttaka í spurnarkapping á síðuni.

Gamla heimasíðan, www.fullveldi.fo hevur fingið spildurnýggjan ham og størri innihald. Kunnandi tilfarið er nógv meira umfatandi enn á tí gomlu útgávuni. Til ber at kjakast um politisku ætlanirnar. Fólk í føroysku umsitingini fara at dagføra síðuna við jøvnum millumbilum.

## Endamálið

Ætlanin hjá landsstýrissamgongu Sjálvstýrisfloksins, Fólkafloksins og Tjóðveldisfloksins er, at Føroya Landsstýri og danska stjórnin gera ein altjóðarættarligan sáttmála, sum:

- stovnar Føroyar sum frælst fullveldisríki,
- verður fráboðaður í ST, og rótfestur í altjóða rætti,
- ásetir, at Føroyar og Danmørk hava sama kong,
- skapar góðar karmar um tætt tilknýti og víðfevnt samstarv í felagsskapinum millum danska og føroyska ríkið,
- skapar líkindi fyri, at samstarvið verður rúmkað, og fleiri samstarvsøki tikin afturat
- og ber við sær eina varliga búskaparliga skiftisskipan, har ríkisveitingin minkar so líðandi, so at Føroyar fáa ein veruligan møguleika at byggja upp ein sjálvstøðugan og sjálvberandi búskap.

